

# Eystara havarøki - november 2021

29454

# - innihald





- FRÁGREIÐING
- LANDSLAG
- SØGA
- FORÐINGAR
- HUGSKOT
- RÁSTØÐUR
- FERÐSLA
- SKALI
- BÝARRÚM
- VEÐURLAG
- FUNKSJÓNIR
- STØÐUMYND
- SKURÐIR
- MIÐBÝARLUND
- TILSVÍSINGAR
- TÍÐARÆTLAN
- SAMANDRÁTTUR


29454

**INNGANGUR**

Við staðsetingini av Tjóðleikhúsi í Havn við Eystaru Vág, hava vit arbeitt við hugskoti, har nýggja tjóðleikhúsið og økið rundanum tilsamans skapar eina heild. Henda heildin er býarrúm í ymsum støddum og skalum – og við einum hierarki, sum leggur upp til samanspæl millum lítla skalan (lítlar støddir) í býinum og stóra landslagsskalan (stóra støddir) sum tjóðleikhúsið, við síni støðd, er í.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Ynski frá Tórshavnar Kommunu er: "Heildarætlanin skal fyrst og fremst taka útgangsstøði í langskygdum býarskipanarligum menningarmøguleikum og hugsandi broytingum á sjósamferðsluøkinum. Tjóðleikhúsið í økinum, eigur tískil at innrita seg náttúrliga í einum gagnligt samspæl við teir skipanarmøguleikar, og ta menningarkós, ið hetta miðdepilsøkið hevur útlit til at hava."

**EYSTARA HAVNAØKI**

Heildarætlanin um Eystara Havnaøki fevnir um eitt øki sum er eyðmerkt av, at landslagið og lendi er sprongt burtur til bryggjubygging. Sjálv bryggjan er stór, fløt og sløtt og víkir soleiðis frá býnum og umhvørvinum, sum er óslætt og gongur oman og niðan. Lendi og manngjørda lendi renna saman og tíðiligt er at skalin er ymiskur. Ein til fólk, og ein til skip og stóra ferðslu.

Burturúr spreingingini er komið eitt berg, har djúpgrundin og hellan kemur fram, og brýtur av sambandið millum býin og sjógvin og landslagið, sum sæst við Skansan.

**MIÐ**

Ætlanin við hesum uppskoti er, at skapa undirstøðið, sum stuðlar býnum og landslagnum, við at økja um margfeldni. Bæði margfeldni í einum býarhøpi, men eisini lívføðiligt margfeldni, sum stuðlar landslagnum,



lendinum og burðardygga lívinum.

Uppskotið leingir og økir um grønu økini frá Viðarlundini og til Yviri við Strond. Grønu økini og landslagið bindur saman býin og havnina. Sprongda bergið sum nú er ein forðing, verður ein ryggur og berandi burðardyggur karmur um býarrúm og nýtt lív og nýtt virksemi. Gamla strandarlinjan verður tikin fram aftur sum amboð til at skapa form og rúm, og vísa sambandið sum áður hevur verið til Skansan og Yviri við Strond.

Miðið er at býarrúmini eru til fólk. Býarrúmini eru rúm til øll frá 0-110 ár at ganga, standa, sita, síggja, hoyra, tosa, koma og fara. Stórur týdningur er at eiga býarrúm sum eru ókeypis at ferðast í og er hetta eisini hugsað



soleiðis við at byggja eina lund.

Vakstarlundin er ein mótvág til kropsliga friðarliga lívið við sitandi arbeiði og bilkoyring, sum nútíðmans býir eru merktir av og gevur møguleika til vanliga rørslu hvønn dag.

Hugskotið er at binda ymisku støddirnar í býnum saman og megna at yvirkoma forðingar sum eru nú, soleiðis at lívið og virksemi flýtur ótarna.

**NÁTTÚRULOYSN**

Fyri at skapa ein góðan bý vilja vit brúka nattúruloysn. Heildarætlanin savnar seg um at skapa vælvirkandi og hugnalig býarrúm við eini náttúruloysn. Ein náttúruloysn er, tá uppskot ella verkætlanir verja, varðveita, endurreisa ella bøta aftur vistskipan, sum handfarir samfelagsmál. Ein býur er karmurin um samfelagið, og hýsir ymiskum samfelagsmálum og náttúru. Ein náttúruloysn í hesum høpinum er bæði ein loysn, sum leggur dent á at fáa ein vælvirkandi  bý, men eisini at fáa lívfrøðiligt margfeldni, og bøta um veðurlagið.

**VAKSTRARLUND VIÐ FØROYSKUM VØKSTRI**

Í høvuðsheitum er ætlanin at byggja eina vakstrarlund við føroyskum vøkstri miðskeiðis í økinum og at skipa býarrúm rundan um ella hvørjumegin hesa. Vakstrarlundin er staðsett og smíðja eftir staðsetingin Tjóðarpallsins.

Lívfrøðiligt margfeldni hevur alstóran týdning og eigur at vera sjónligari, eisini í býarhøpi. Vakstrarlundin er eitt slag av sýnisglugga fyri lívfrøðiligum margfeldni við føroyskari flora og fauna, umframt at fólk fáa eitt grønt øki at vitja ella ganga ígjøgnum. Hetta er serliga týdningarmikið, nú man er farin at byggja fleiri íbúðir og ikki øll hava urtagarð longur. Kanningar vísa eisini, at fólk eru betri fyri tá náttúran er nærri at har fólk búgva og eru.

Fjølbroytni (bygningar og vøkstur) má vera stórt, byggjast má so tætt sum gjørligt og lývd má verað fyri veður og vindi og staðsetingin er í trá við góðan sólargang og burðardygd.

Vakstarlundir og grøn økir hava stóran týdning fyri djóra- og plantulív. Fuglar fara ikki at støðast, men fáa ein steðg, finna friðskjól og føði, og skapa eisini lífrøðiligt margfeldni. Kykt sum t.d. humlur (dustari) sum eru komnar til Føroya gera at vøksturin er farin at trívast betur og stimbrar lívfrøðiliga margfeldni.

**LÍVFRØÐILIGT MARGFELDNI**

Lívfrøðiligt margfeldni er ein háttur at fáa burðardyggari býir og bygdir og minka um vakstrarhúsgass. Lívfrøðiligt margfeldni gevur ágóðar sum; at binda $CO_2$,

reinari luft, føroyskar plantur høvdu fingið frið at vaksa (tað fáa tær ikki har seyður er), betri býarrúm fyri bæði fólk og dýr, kykt, fuglar og plantur og vistskipanina sum heild. T.d. bindur vátlendi 3 ferðir betri CO2 enn skóg og viðarlund. Vakstrarlundin, sum vit viðmæla at gera, er ætlandi grunda á natúrliga seyringarskipan við mosa og gróti har vatn rennur.

**BÝARRÚM**

Hvørju megin við vakstrarlundina eru býarrúm sum í stødd eru í tráð við verandi bý og bygging sum er nærhendis, og passaligt til fólk til gongu.

Frá Áarvegnum og Undir Ryggi oman undir Kákagøtu og Skansavegnum vísir uppskot okkara eitt býarrúm vart av verandi trøðum við berginum sum rygg, og lendi við vøkstri millum húsini. Býarrúmið er leingjan av býarrúminum Undir Ryggi bæði í stødd og skap. Stødd og skap er við íblástri frá gomlum kortum, sum vísa hvar hús hava staðið áður. Saman við berginum og verandi trøðum og góðum sólargangi, er hetta býarrúm við góðum lokalum veðurlagi, sum ger hetta til eitt væl vart og heitt útirúm, har stutt er ímillum frá og til. Eitt sum eyðkennir gomlu býarpartarnir í Havn, er nevniliga lývd og gott lokalt veðurlag, og at stutt er at ganga ímillum húsini.

Býarrúmið undir Vaktarhúsgøtu og Jónas Broncksgøtu yvir ímóti Yviri við Strond hevur størri stødd og størri bygningar, sum byggja upp til Skansan og til innkoyring til parkeringshús undir vakstrarlundini, og uttanfyri bygningarnar her. Sprongda bergi, sum hesumegin er lægri, er ein ryggur saman við bygningunum sum her eru størri. Bygningarnir eru, eisini her, staðsettir soleiðis at teir líva fyri vindi og skapa eitt býarrúm sínámillum og peika ella leiða yvir til bygning undir Skansanum, sum er tengdur at Skansanum og byggir brúgv og atgongd til Skansan. Skansin er, sum nú er, avbyrgdur frá býnum og bryggjuni.



**FJARSTØÐUR OG STØDDIR**

Soleiðis, sum økið við Eystaru Bryggju er í dag, er langt at ganga ímillum. Hetta ger at virksemi og býarlívið ikki er líka virki, sum har tað er styttri ímillum. Tí eru staðsett hús og bygningar í vakstrarlundini og yvir til næsta býarrúmið undir Vaktarhúsgøtu og Jónas Broncksgøtu yvir ímóti Yviri við Strond. Fjarstøður og býarrúmini er gjørd eftir fjarstøðum og teinum í miðbýnum, sum gera tað lætt og stuttligt og áhugavert at ganga ímillum ymisk støð og bygningar.

**GAMLA STRANDARLINJAN**

Gamla strandarlinjan markerar og vísir hvar lendi var fyrr, og hvar bryggjan er nú, og vísir skiftið millum vøkstur og harðari tilfar at ganga á. Frá Áarvegnum og úteftir er sløtt kai við trappum niður ímóti sjónum og bátum og skipum. Her vilja vit at møguleiki skal veðrað fyri at koma heilt oman í "fjøruna", og uppliva slætta sjógvin við kai og ymisku støddirnar frá gamla partinum og út til Tjóðleikhúsið og úteftir til skipini.

Sum heild er lagt dentur á, at sambandið millum ymisku býarrúmini skal vera gott og ómakaleyst at nýta, og at samband er omanav Skansavegnum og oman til Havnargøtu. Vakstrarlundin bindur saman býin ella seymar sári saman, sum áðurnevnda sprængingin hevur gjørt.

**UPPSKOTIÐ**

Í Uppskotinum eru fleiri økir/býarrúm við ymiskum virksemi við ymiskum brúkarum. Økini eru 6 í tali.

Fyrsta økið er frá Áarvegnum og Kongabrúnni til og við Bursatanga. Økið byrjar við eini promenadu við frá ósanum, framvið bátahylinum og yvir ímóti Bursatanga og blívir liðandi til eitt torg fram til Tjóðleikhúsið. Einstakir bygningar eru, sum neyst, kunningarstova og lítil terminalur til Nólsoyarleiðina. Harumframt er smáparkering og uppmarsjur til Nólsoyarleiðina.

Annað økið er frá Kongabrúnni, fram við Kákagøtu og undir Skansavegnum. Í hesum økinum eru minni bygningar har handlar, matstovur og kaffihús. Hetta økið leggur seg upp at sprongda berginum og leggur dent á grønan vøkstur og trø ímillum húsini.

Triðja økið er undir Skansavegnum og oman ímóti kaiini og tjóðleikhúsinum, og fer heilt yvir ímóti Skansanum. Hetta øki er vakstrarlund við bygdarhúsi og bilparkering undir.

Fjóðra økið er undir Vaktarhúsgøtu og Jónas Broncksgøtu yvir ímóti Yviri við Strond. Her er handil smáparkering og innkoyring til innandura parkering undir vakstrarlundini.

Fimta økið er við Havnargøtu og undir Skansanum. Her er býarsavn og gøtur.

Sætta økið er frá Havnargøtu út ímóti Eystari Brygguni og inn til Tjóðleikhúsið. Í hesum øki er Buss- og skipaterminalur, uppmarsjur og buss- og bilparkering.

**ATKOMUVEGIR**

Atkomuvegur til og frá Eystaru Bryggju er skipaður eftir at bilferðslan út úr býinum er oman eftir Áarvegnum og inn í býin eftir eftir Jóna Broncksgøtu og Yviri við Strond til og við Tjóðleikhúsið og Nólsoyarleiðina, har bussleiðin eisini koyrir. At geva fólki stað at seta bilin og sleppa at ganga, minkar um ferðslu og útlát og lættir um ferðslutrýsti í miðbýinum. Burðardygd og heilsagott umhvørvi geva tilsamans eitt vinarligt umhvørvið og ein vinarligan bý.

Frá sjónum við skipi og báti, er bryggjan og Tjóðleikhúsið, tað sum skarar framúr. Okkara uppskot er bakteppi, sum miðlar og er millumgongufólk millum stórskala bygningin Tjóðleikhúsið, til býin. Vakstrarlundin og býarrúmini binda støddirnar og skalan saman í eina natúrliga heildarmynd.

Bragd og skap á vakstararlundini fer at standa væl saman við Tjóðleikahúsinum bæði í stødd og sterkari hjáveru í býnum.

Tjóðleikhúsið og vakstrarlundin skapa tilsaman eina býargrind ella portur til býin til landslagið og Havnina. Frá sjónum fer Havnin at taka ímóti við tjóðmentan og landslagi og vøkstri, sum er stórur partur av føroyska samleikanum.

Har sum sprongt er burtur samantvinna vit nýggja og gamla søgu.

# - landslag




EYÐKENNI

Landslagi um og í Havnini gongur oman til sjógv við áum sum býta lendi sundur, har summar enda við ósa í miðbýinum niðuri við bryggjuna.

Her er ein søga ella eitt upplivilsi, har man sleppur at uppliva bæði fjøll og sjógv í eini ferð framvið áunum og oman - ella niðan.

Hvussu ber til at ala fram hesi eyðkennir í einum býarrúmið?




VÍDD Á BÝINUM

Býurin er umgirdur av haga og grønum lendi, meðan áirnar býta býarpartar sundur.

Havnin er vaksin so hvørt. Húsini og fólkini standa longur og longur burtur frá sjónum niðaneftir. Húsini og fólkini niðuri við sjógvin standa longur burtur frá haganum og grønum lendi.

Hvussu kann man seta aftur hesa upplivingí?




GRØN ØKIR Í BÝINUM

Tey grønu fríøkini eru oftast rundanum og framvið áirnar og omanerftir.

Tvey grøn fríøki røkka allan vegin oman til sjóvarmálan. Fríøkið við Hoydalsá og Fríøki við Sandá.

Í miðbýinum eru færri og færri grøn økir og kanska er tað her, at man saknar tey mest, hóast man sær bæði niðan á fjøll og út á sjógv.

Hvussu fær man støð við vøkstri og grønum lendi í miðbýnum?




GRØN ØKIR Í FOKUS

Fokus er á, at halda á fram ella bøta um verandi vøkstur og grønu økini inn í miðbýin.

Tvey grøn fríøkir ganga inn í Havnina og ikki er langt ímillum tey. (Sí kort)

Hesi grønu fríøki kunnu sameinast við at lata Havnará upp frá Viðarlundini og oman til Kongabrúnna.

Vit skjóta upp at fáa náttúruna inn aftur í býin við at sameina hesi økir í eini vakstrarlund á Eystaru Bryggju.








SØGA

Á kortinum oman fyri sæst strandarlinja (ár 1895), landslagið og húsini, sum tá vóru í Havn.
Samband er við vegi út á Skansan, ánna og fjøra ella sjóarmáli er.
Soleiðis, sum Havnin er nú, eru tað enn hesi gomlu húsini, sum mynda miðbýin í støðum.
Havnin hevur síðani ment seg til ein Havnarbý við bryggju og kaium og stórum arbeiðsarealum til skip og farm.

Í hesi menningini er Havnará løgd undir veg og lendi sprongt burtur til kaiøkið og útbygging. Býurin við Eystaru bryggju nú, er bygdur til bilar, skip og farmaflutning.

Hvussu kunnu vit gera pláss fyri fólkunum aftur?

YVIRI Í TRØÐ

*"...fyri 1885. Skansavegurin er oman fyri hjallin vinstrumegin garðin við lokuni. Hendan býarmyndin fall fyri framburðinum í sextiárunum, tá økið av Kongabrúnni og út á Skansan var sprongt burtur."*

Myndin vísir ein bý ella bygd har alt er í støðd og fjarstøðum til fólk at vera í og ganga í. Stutt er at ganga oman í fjøruna og stutt er at ganga niðan á.

Hesar støddir og fjarstøður eru burtur nú, men kunnu takast fram aftur.

Hvussu fáa vit hetta fram aftur?

SØGULIG SPOR OG ENDURSKAPAN

Gamla strandarlinjan markerar og vísir hvar lendi var fyrr, og hvar bryggjan er nú, og vísir skiftið millum vøkstur og harðari tilfar at ganga á.

Nógvar broytingar eru hendar á Eystaru Vág ígjøgnum tíðirnar og vit vilja taka grøna lendi, sambandið til Skansan og støddirnar og fjarðstøðurnar til fólk framaftur.

Uppskotið tekur støðið í gomlu strandarlinjuna, sum amboð til at fáa hetta aftur.

Myndin (til høgru) vísir lendi sum er sprongt burtur og manngjørda lendi og kaiøkið.

Eisini sæst gamli býlingurin í Trøðum á myndini. Hetta vísir væl støddir tá man hevur bygt til fólk og støddir tá man hevur bygt til skip og bilar og farm.
Uppskotið byggir á at taka søgulig spor uppaftur soleiðis:

- Strandarlinjan verður skapa av álegging og kantum
- Lendið verður í støðum etablera aftur við at byggja parkeringshús undir eini føroyskari vakstrarlund.
- Bygningar Yviri í Trøð; smærri bygningar ið hýsa minni virksemi og feløgum av maritimum slag.
- Samband til Skansan við at byggja gøtu niðan á Skansan umframt eitt loddrett samband framvið berginum frá einum Býarsavni.

# - forðingar



FORÐINGAR

Bergið niðan ímóti skansavegnum brýtur av sambandið millum býin og sjógvin og landslagið, sum sæst við Skansan. Skansin er, sum nú er, avbyrgdur frá býnum og bryggjuni.

Eystar Bryggja er ein stór flata, og langt er at ganga ímillum. Hetta ger at virksemi og býarlívið ikki er líka virki, sum har tað er styttri ímillum.

Bryggjan er merkt av væntandi samband til kai kantin og oman til sjógvin.

Fjarstøðan er stór forðing í dag eins og ferðslan eisini byrgir av.



LOYSNIR

- At minka um fjarstøður
- At gera øki atkomuligt
- At innføra støddir, teinar og leiðir til fólk
- At endurskapa lendi sum eina býarlund
- At minka um stóru sløttu flatuna
- At skapa atgongd til Skansan
- At betra atgongd til sjógvin
- At skipa ferðsluna betur
- At binda býin saman og viðka miðbýin omaneftir



JALIG EYÐKENNIR

- Mangjørt berg
- Trø og grønur vøkstur er framvið mangjørda bergi-num.
- Stór kai og nógvir metrar av bryggju.
- Søgulig bygningsverk, Skansin, Tinganes.
- Stórt landslagsrúm mitt í býnum
- Stórt himmalrúm
- Gott útsýnið frá Skansavegnum og Skansanum
- Søgulig hús gamlir býarpartar



SAMANTVINNING

Havnará, grøni geirin Við strond og grøna øki við Skansan verður sammantvinna søguliga via gomlu strandarlinju-na, sum tekur fram aftur ein gamlan form, men er eitt nýtt landslag sum leingir og sameinir tvey grøn skap í bý-num.

Hetta verður gjørt við at gera eina føroyska lund við grø-num plantum, sum strekkir seg oman til Tjóðleikhúsið, og deilir kaiøki upp í tvey minni býarrúm. Hetta gevur hvørt økið sítt eykenni og gevur lývd og gott lokalt klima.




YMISK BÝARRÚM

1. Íbinding til miðbýin. Smábátahylur við promenadu.
2.Býarlund, parkeringshús og borgarahús upp at bergi-num, við øki til tænastuvinnu.
3. Skansin og býarsavn við sambandi beinleiðs frá bý-num.
4.Tinganes.
5. Skipahavn, við nýggjari farstøð og uppmarch til Smyril.
6. Bingju-og farmahavn, við nýggjari farðstøð og upp-marchøki til Norrønu.



# - frástøður




FJARSTØÐUR

Teir flestu gomlu býirnir hava ein miðbý uppá 1km, hesin teinurin er passaligur tá man er til gongu, og stutt er til tær flestu funktiónirnar.
Frá Gundadal til Skansan er 1 km.

Tað tekur 12 min. at ganga 1 km. Á leið 500 m er ein rímulig fjarstøða at ganga fyri flest fólk, men hetta er treyta av góðskuni á gongutúrinum, bæði viðvíkjandi upplivingum, lývd, sólargangi, og undirlagnum man gongur á.

Fjarstøðan í dag frá Eystaru vág til Farstøðina er gott 200 m, í uppskotinum er fjarðstøðan millum upplivinganar max. 50 m. Hetta fer at økja um gangandi fólk í økinum.

Staðseting av parkeringshúsið er gjørd við hesum fyri eyga. Stutt er til og frá parkering, Tjóðleikhúsið og býarlívi.

*"Acceptable gåafstande er omkring 500 m for at flertal af gående. Det er dog en betinget sanhed, fordi acceptabel gåafstand altid vil være et spørgsmål om kombinationen af afstand og rutens kvalitet. Er komforten lav, bliver turen kort, er ruten spændende, oplevelsesrig og komfortabel, glemmes distancen, og man glæder sig over oplevelserne."*
*(Livet mellem husene - Jan Gehl)*



Leið og fjarstøða í dag



Leið og fjarstøða framtíð



FERÐSLA Í DAG

- Fólk til gongu- torført er at ganga í økinum, prioriteringin er til bilferðslu
- Fólk á súkklu- eingin serstøk atgongd til fólk á súkklu
- Uml. 210 parkeringspláss innan heildarætlanarøkið
- Bilar- atkoma til og frá miðbýi til Eystaruvág
- Bussar - Einans bygdarleiðir steðgar innan heildarøkið
- Tung ferðsla- út á kaiina



FRAMTÍÐAR FERÐSLA

- Fólk til gongu og fólk á súkklu- nógv fleiri gøtur tvørtur um alt økið
- Uml. 310 parkeringspláss innan heildarætlanarøkið, herav eru uml 200 p-básar í parkeringshús
- Stórsti parturin av parkeringsplássinum verður stápla og goymd burtur so plássið kann verða brúkt til tjóðleikarhús, fólk og býarrúm
- Møguleikið er fyri at grava parkeringshús niður í lendið, so enn fleiri p-pláss fáast
- Ein partur av parkeringshúsinum kundi verið priva útleiga
- Einvegis atkoma frá miðbýi til Eystaruvág fyri bilar. Innara býrúm verður friðarligari, við seyru-ferðslu.
- Bilar venda út aftur á torginum, har busstoppistað til býarbussin er og inngongd til parkeringshús.
- Býarbussurin steðgar innan heildarøkið, á torginum og við farstøðina
- Nýggj størri rundkoyring verður staðsett longur niðri á kaiini. Lættari hjá tungari ferðslu og bussum at koma runt

# - skali







SKALA

- Skalin er ymiskur alt eftir hvar og hvussu man bindur býin saman.
- Har sum gomlu húsini og støddirnar eru smærri, verður skalin lagaður til, og har sum Skansin er, verður skalin lagaður til størri støddir
- Viðarlundin leggur seg upp at Tjóðpallinum og upptekur allar støddir og lutføll

SKIFTIÐ

- Skiftið millum innanra og uttara býarrúm verður markera í lendinum, við at gera eina kanal á kaiøkinum.
- Tað er eisini her at belegningurin skiftur frá býarbelegningi (flisar o.a.) til kajbelegningur (betong og asfalt).
- Væl av tilfarið endurspeglar skiftið millum ymisku býarrúmini.

PORTUR

- Skansin og tænastufyritøki skapa eitt portur inn til havnarrúmið
- Býarpark og Tjóðleikhús skapa eitt portur inn og úr miðbýnum
- Tjóðleikhúsið og býarlundin verða "pallset" sum serlig rúm og ramma inn útsýnið út á Skansan

LARMUR OG SKALA

Skala gongur frá stór-skala og larm til lítlan-skala og frið, longur man kemur inn í býin.



# - býarrúm






SKALA

Inni í Eystaruvág verður eitt býrrúm skapt sum inniheldur Tinganes, atgongd til sjógv, eina býarlund og eitt torg.

Alment torg og forpláss til Tjóðsavnið strekkjir seg frá Áarvegum til Tjóðleikahúsið. Tað er eitt framhald av miðbýnum og hevur beinleiðis samband til bryggjukant og sjógv.
Torgið er bindur allar gøtur í økinum saman, hevur øki ið eru friðarlig, so sum promenadan oman móti sjógvin, ella býarlundin undir berginum, men eisini meir dynamisk rúm, við dagligdagsferðslu, bussum, fólk til gongu, súkklum, v.m.

Tá serlig tiltøk eru, er tað er umskiftiligt og kann nýtast til alsskins mentunartiltøk o.a.
Býarlundin saman við nýggja Tjóðleikarhúsið skapar hetta rúmið (grýtuna)

Eystanfyri hevur býarrúmið ein størri skala. Her eru tænastufyritøkur, so sum handlar, matstovur ella hotel, innkoyring til bilhús, umframt farstøðin við tí lívið ið har er rundanum.

VEÐURLAG

Sól- vindur- lývd



# - funktiónir



Býarsavn við atgongd niðan á Skansan

Tænastufyritøkur

Tunnilsinnkoyring til parkeringshús

Forpláss til farðstøð

Føroyska vakstrarlundin

Borgarahús bygt inn og undir vakstrarlundina

Tjóðleikarhúsið

Býarlund upp at berginum

Torg og forpláss og til Tjóðleikarhúsið

Ferðslupláss

Bíðihøli til ferðafólk til Teistan og kunningar-
stova

Tæmastufyritøkur

Trappulendi oman til sjógvin

Havnará

1:2000


Eystara havarøki - november 2021
1:1000
2 9 4 5 4


Fútastova
Áarstova
Tryggingafelag Føroyar
Gomul hús
Stephansons hús
Tænastfyritøkur
Býarlund
Inngongd til parkering
Inngongd til borgarahús
Føroyska vakstarlundin
Tænastfyritøkur
Matstovan Angus
Býarsavn
Skansin
1:1000


Tinganes
Hotel Hafnia
Fútastova
Áarstova
Havnará
Tryggingafelag Føroyar
Tjóðleikhús
Føroyska vakstarlundin
Borgarahús
Tænastfyritøkur
Tænastfyritøkur
Matstova Angus
1:1000


Skansavegur
Sprongda bergið
Borgarahús
Føroyska vakstarlundin
Parkeringshús
Tænastufyritøkur
Skansin
Býarsavn
Tjóðleikhús
Bussterminalur
Smyril
Norrøna
1:500


Tryggingafelag Føroyar
Føroyska vakstarlundin
Skansin
Tjóðleikhús
Reyn
Skip til suðuroyar
Terminalur
Brimgarður
1:1000

## - miðbýarlund



## - tilvísingar



- Býarsavn og Skansin
- Landslag sum stórur skala inni í býnum
- Tjóðpallur og landslag og lendi



- Borgarahús inni í heyggjinum við útsýnið yvir kajøkið
- Bygningur sum landslag. Parkeringshúsið er undir einum heyggi, eitt landslag, við føroyskum landsløgum og plantum.
- Ljós- og atkomuskaktir niður í parkeringshúsið
- Benkir í lívd og sól



- Bygningur til bilar undir graslendi við smáum bygningum á við lyftum, trappum og dagsljósi.
- Bygningurin stendur upp at berginum og dagsljós verður millum berg og parkering
- Inngongdin verður soleiðis at hon verður markera uttan, samstundis sum lendi kemur niður at á báðum síðum



- Landslag og pláss rennur saman
- Flísar við relief sum fortelur eina søgu um staðið
- Spælipláss og aktivitetir

## - tilvísingar






- Kanturin vísir gomlu strandarlinjuna og er ymiskur alt eftir tørvi og funktión t.d. pláss at sita ella kantsteinur, skifti millum gonguteig, bilveg og viðalund.





- Møguleikið er fyri at uppliva bergið á ymiskan hátt. At ganga framvið, hyggja útyvir, sita inni undir í býarlundini, uppliva sum upprunaligt inni frá parkeringshús, og at ferðast upp framvið á Skansanum.
- Lættari atkoma at vatninum.






- Margfeldi við føroyskum upprunaplantum
- Lyngur
- Trøllakambar






- Mosi
- Pílur
- Lyngheiðar
- Skón

## - tíðarætlan



2025
- Smyril verður vendur við, atløgan verður í syðra enda á Eystaru Bryggju.
- Nýggj farstøð- tornið flutt
- Faroe ship flutt út á molan.
- Smyril Line flutt longur út við nýtt pakkhús og ferðafólkaterminal.
- Bíðihøli til Teistan
- Byggja promenadu við Kongabrúnna.

2028
- Nýggj rundkoyring og vegir
- Grøna økið við Skansan útbygt
- Byggja Parkeringshús og umskipa bil- og bussferðslu og byrja arbeiði við at byggja og planta vakstrarlundina.
- Tjóðleikarhús

*Vegir og parkering hongur neyvt saman við tjóðleikarhús, tí má hesi verða liðug áðrenn ella samstundis.*

2030
- Suðuroyarsiglingin niðurløgd (plássið kann nýtast til onnur skip)
- Borgarahús og onnur tænastavinna bygd
- Skipa økið frá Kongabrúnni, fram við Kákagøtu og undir Skansavegnum. Býarlund

2035
- Byggja býarsavn og samband hagani upp á Skansan.

*Havnará opna og Ríkisumboðs-garður opnaður*

## - samandráttur











